Fleiri rásir - einki roks

Á DR2 sunnukvøldið kl. 22.20

# Fuglarnir

Filmurin "Fuglarnir" mann vera ein hin mest vælskipaði og álvarsami ræðufilmurin, ið ræðslumeistarin, Alfred Hitchcock, nakrantíð hevur gjørt. Filmurin er frá 1963, og fleiri hava tulkað hesa søguna um fuglar, ið loypa á menniskjað, sum eina søgu um endaliga kjarnorkukríggið, ið ger ein enda á øllum. Men filmurin er tó ein sera eyðkendur Hitchcock-filmur við eini væl tilrættislagdari frásøgu um dulda ræðslu og ótryggleika, ið brádliga leggur sín myrka skugga yvir gerandisdagin hjá nøkrum sera sjálvglaðum persónum. Høvuðspersónurin er hin vælhavandi og forkelaða Melanie Daniels, sum fjasast við unga sakføraranum Mitch Brenner. Melanie fer aftaná Mitch til stóra húsið hjá mammu Mitch, ið liggur í Bodega Bay norðanfyri San Francisco. Á vegnum higar leggur ein likka á hana, hví veit hon ikki. Eftir henda løgna tilburðin, kemur hon ræðslusligin vegin fram. Hon ger alt fyri at fáa at vita so nógv sum til ber um Brenner-familjuna. Hon varnast, at Mitch hevur eitt heldur óvanligt samband við sína sera ráðaríku móðir, ið heldur honum í sera strongum teymum. Melanie fær eisini at vita, at hann hevur gingið saman við lærarinnuni í økinum. Tað eru hesi fólkini, ið verða rakt av vanlukkuni, tá fuglarnir - svalur, starar, likkur, uglur og krákur - leypa á. Melanie og Brenner-familjan hava fram um alt leita eftir tryggleika í lívinum. Hvussu gera tey nú, tá ræðslan, ið tey hava roynt at treingja burtur, er ein lívshóttandi og veruligur vandi? Eingin tónleikur liggur undir filminum, men í staðin eru effektljóð á ljóðsporinum, ið stava frá fuglaskríggi - og hesir tónar fara ígjøgnum mønu og merg.



*Fuglarnir loypa á, og eingin veit veruliga hví teir gera so. Melanie og Brenner-familjan hava fram um alt leita eftir tryggleika í lívinum. Hvussu gera tey nú, tá ræðslan, ið tey hava roynt at treingja burtur, er ein lívshóttandi og veruligur vandi?*



*Ræðufilmurin, klassikarin "The Birds" eftir Alfred Hitchcock frá 1963*

Á NRK1 mánakvøldið kl. 20.30

# Dok1: Ungdommens Råskap

Dokumentarfilmurin hjá Margreth Olin fekk sera góða móttøku av bæði ummælarum og fólki annars, tá filmurin kom út í fjør. Somuleiðis setti filmurin av álvara gongd í kjakið um fólkaskúlan yviri í Norra. Margreth Olin fylgdi einum 10. flokki við Hauketo Ungdomsskole í Oslo. Við Lars von Triers strongu dogmu-lógum í huga fór Olin í gongd við at taka upp. Út av 120 tímum av upptøkum hevur Olin skapað ein dokumentarfilm uppá 80 minuttir. Og her síggja vit m.a. rumbul í skúlastovuni, adrenalinbumbur í fimleikatímunum, vónloysi og undirlutakenslur, gleðisløtur og illsinnið, sum einans 16 ára gomul kunnu bera tað fram. Serliga verður fylgt við einum holdi í motorlæru, sum av ymiskum orsøkum hevur valt at síggja burtur frá teori og heldur leggja seg eftir einum meiri praktiskum skúladegi. Filmurin lýsir m.a. orkufyltar tanáringar, ið ikki sleppa av við hesa orkuna á skúlanum. Vit síggja eldri og vælmeinandi lærarar royna sítt besta at læra frá sær, men ofta er hetta ein sera stríggin tilgongd. Olin og hennara filmslið koma sera nær at teimum ungu á skúlanum, ofta tykist tað sum um, at kamera als ikki er til staðar. Ungdómarnir bera seg sera erliga at, og kenslurnar fáa fult flog, sjálvt um myndatól eru hjá. Hetta dregur hyggjaran, provokerar og ger ein áhugaðan í hesum 10. floks næmingunum.



*Rumbul í skúlastovuni, adrenalinbumbur í fimleikatímunum, forelskilsi, vónloysi og undirlutakenslur, gleðisløtur og illsinnið, sum einans 16 ára gomul kunnu bera tað fram - alt hetta er partur av áhugaverda dokumentarfilminum, "Ungdommens Råskap".*



*Dokumentarfilmurin hjá Olin setti av álvara ferð á kjakið um norska skúlan*